*Í felag fyri teg*

# PEDAGOGBLAÐIÐ

Nr. 3 | Heystið 2023 | pedagogfelag.fo



**Landsstýrismaðurin:**
## Loysn skal vera klár næsta skúlaár

**Prát við næmingar:**
## – vilja helst lesa víðari í Føroyum

## Pedagogformaðurin og landsstýrsmaðurin halda fast um pedagog-minstamark

## Skúlaskipan rekur næmingar av landinum

## Persónlig samrøða eigur at vektast

FØROYA PEDAGOG FELAG

Útgevari
Føroya Pedagogfelag
Tel. 35 75 76
pedagog@pedagogfelag.fo
www.pedagogfelag.fo

Lagt til rættis
Ingolf S. Olsen - PRESS

Layout
Grafikmaster
www.grafikmaster.fo
info@grafikmaster.fo

Prent
Føroyaprent
www.foroyaprent.fo

Upplag
2.000 eintøk

## NEVND


Jógvan Philbrow
Formaður
jogvan@pedagogfelag.fo


Nikkil Heinesen
Næstformaður
nikkil@pedagogfelag.fo


Annika Østerø
Skrivari
annika@pedagogfelag.fo


Harald Joensen
Nevndarlimur
harald@pedagogfelag.fo


Gunnvá A. Hansen
Nevndarlimur
gunnva@pedagogfelag.fo

## UMSITING


**Jógvan Philbrow**
Formaður
jogvan@pedagogfelag.fo


**Birita Hammer Jacobsen**
Umsitingarleiðari
birita@pedagogfelag.fo


**Gudny Benjaminsdóttir**
Bókhaldari
gudny@pedagogfelag.fo


**Bára Sólheim Guttesen**
Málsviðgeri
bara@pedagogfelag.fo

**4** Lønt útbúgving og fjarlestur er loysnin

**10** Skúlaskipan rekur næmingar av landinum



**15** Tað góða barnalívið

**16** Næmingar vilja helst lesa víðari í Føroyum

**23** Bíða enn eftir samráðingum

**25** Áseting um starvsfólkabýti skal standa við

**27** Persónlig samrøða eigur at vektast

**29** Námsfrøðingar eiga at manna námsfrøðistørv

**32** Loysn skal vera klár næsta skúlaár

**34** Greta vardi ph.d. ritgerð um trivnað



# ODDAGREIN

Jógvan Philbrow, formaður, skrivar

# Vit vilja reisa okkara yrkisøki

Samráðingar standa nú fyri framman, og hóast vit eiga at lata væl at, tí tónarnir frá politisku myndugleikunum eru góðir og jaligir – við lyftum um lønarlyft – so er spurningurin, á hvønn hátt hendan vælvildin kemur til sjóndar, tá avtornar, og pengarnir skulu á borðið.

Vit hava fyrr fingið gylt lyfti, har politikararnir aftaná hava roynt at drigið væl og virðiliga í land aftur. Teir batar, vit fyrr hava fingið, hava tíverri kravt harðar samráðingar, seming og stríðsstig, áðrenn komið varð á mál. Vit fara sjálvandi at gera okkara til, at samráðingarnar á hesum sinni ganga so siðiliga og væl, sum gjørligt.

Vit fara til samráðingarborðið við einari ætlan fyri, hvussu økið veruliga kann reisa seg í kappingini um starvsfólk og gera tað meira áhugavert at útbúgva seg, tað veri seg til námsfrøðing ella til námsfrøðishjálpara.

Tað eru nógv øki, ið eru dragnað afturúr, og nakrar tillagingar mugu gerast fyri at fáa viðurskiftini í rættlag aftur.

Vit eru greið um, at tað pínir fíggjarstøðuna hjá nógvum, at lønarviðurskiftini ikki verða dagførd nóg skjótt. Korini eru trong, sum er, og tá ein lønarhækking ikki kemur, tá hon eigur, gerst støðan ikki betur.

Einki fakfelag á almanna arbeiðsmarknaðinum tykist tó megna at fáa samrátt seg liðugt til tíðina, og fleiri feløg bíða eftir, at fáa síni viðurskifti upp á pláss. Hví so er, eru helst fleiri meiningar um, men nógv bendir á, at mótparturin ikki setur neyðuga orkuna av til endamálið.

Alt er tó ikki bara samráðingar – á fakliga mótinum eru eisini broytingar. Pedagogfelagið er farið í gongd við at gera poddvarpssendingar, Námsvarpið, og Nicodemus Líggjasson, námsfrøðingur, er vertur. Vit hava longu fingið tríggjar partar út, og tann triði er á gáttini. Námsvarpið er at finna á heimasíðu felagsins.

Fyrst í september var eisini ein stórhending í námsfrøðiligari gransking í Føroyum, tá Greta Jiménez vardi sína ph.d.-ritgerð á Danmarks institut for Pædagogik og Uddannelse, DPU. Heitið á ritgerðini er “At "reika" i den færøske daginstitution”. Í ritgerðini fáa vit innlit í partar av tí, ið tykist eyðmerkja dagstovnanámsfrøðina í Føroyum. Tit finna eisini eitt leinki til ritgerðina á heimasíðuni hjá okkum, pedagogfelag.fo.

Vit vænta, at nógv meira verður at hoyra um ritgerðina og granskingina hjá Gretu í framtíðini.

Ein onnur stórhending er umberingin frá donsku stjórnini til teirra, ið vóru flutt í vardar bústaðir og stovnar í tíðarskeiðnum 1933-1980. Ímillum



teirra vóru fleiri føroyingar, sum vóru fluttir í fremmant umhvørvi undir ókendum umstøðum, og har fleiri teirra síðani vórðu fyri svíki, harðskapi og øðrum ágangi.

Umberingin kemur sum ein viðurkenning av, at staturin ella samfelagið hevur givið hesum menniskjum skeiva og óvirðiliga viðferð. Ein áminning um, at vit sum samfelag altíð mugu stremba eftir at bøta um tænasturnar til okkara veikastu borgarar.

Pedagogblaðið, tú nú situr við í hondini, tekur í stóran mun fatur í útbúgvingarnar fyri námsfrøðiliga øki, serliga tvørrandi samanspælið ímillum námsfrøðihjálparaútbúgvingina á Heilsuskúlanum í Hovi, sum nú hevur trý ár á baki, og sjálva námsfrøðingaútbúgvingina á Setrinum, har upptøkukapasiteturin nú er tvífaldaður.

*Góðan lesihug.*

# LØNT ÚTBÚGVING OG FJARLESTUR ER LOYSNIN

**Stjórin á Heilsuskúlanum í Hovi ivast ikki í, at áhugin at taka útbúgvingarnar, sum skúlin bjóðar, hevði verið munandi størri, um næmingarnir fingu løn undir útbúgving, og partur av undirvísingini var fjarlestur. Tað hevði eisini verið skjótasti mátin at bøtt um stóra starvsfólkatrotið á umsorganarøkinum og á dagstovnunum, heldur hon**

INGOLF S. OLSEN – PRESS

Tað hevði borið til at fingið væl fleiri næmingar ígjøgnum útbúgvingarnar á Heilsuskúlanum í Hovi og tískil lætt um starvsfólkatrotið á heilsu- og røktarøkinum og dagstovnaøkinum, ið eru júst tey økini á landsalmenna og kommunala arbeiðsmarknaðinum, sum í løtuni lýða harðast í so máta. Í stuttum er loysnin í fyrsta lagi løn undir útbúgving og í øðrum lagi meira fjarlestur.

Tað heldur Vivie Kirke Davidsen, stjóri á Heilsuskúla Føroya í Hovi. Men tað er politiska skipanin og skúlamyndugleikarnir, sum hava skrúvað útbúgvingarnar á Heilsuskúlanum saman, og tí veldst tað um hugin hjá politikarunum at gera broytingar, um ætlanin er at fáa loyst proppin ella trekleikan, tá tað ræður um at útbúgva fleiri starvsfólk til umsorganar- og ansingarøkið.

Á Heilsuskúlanum ber til at lesa til heilsuhjálpara, heilsurøktara og námsfrøðihjálpara, og leskiligasta gularótin at lokka fleiri næmingar til skúlan er at skipa útbúgvingarnar sum løntar yrkisútbúgvingar, eins og tær eru skipaðar í Danmark, heldur stjórin.

– Eg haldi, at tað, sum heldur tølini á lesandi niðri hjá okkum, er, at fólk hava ikki ráð. Tí eri eg ikki í iva um, at um løn undir útbúgving kemur, so er í hvussu er tann trupulleikin loystur, sigur Vivie Kirke Davidsen.

## Løn undir útbúgving

Í Danmark eru sonevndu SOSU-útbúgvingarnar – SOSU-hjálparaútbúgvingin og SOSU-assistentútbúgvingin – og útbúgvingin til pedagogiskan assistent sambæriligar við ávikavist heilsuhjálpara-, heilsurøktara- og námsfrøðihjálparaútbúgvingarnar á Heilsuskúlanum í Hovi.

Hesar útbúgvingarnar eru yrkisútbúgvingar í Danmark, og tað merkir, at næmingarnir eru knýttir at einum



*– Eg haldi, at tað, sum heldur tølini á lesandi niðri hjá okkum, er, at fólk hava ikki ráð. Tí eri eg ikki í iva um, at um løn undir útbúgving kemur, so er í hvussu er tann trupulleikin loystur, sigur Vivie Kirke Davidsen, stjóri á Heilsuskúlanum í Hovi*

*Mynd: Ingolf S. Olsen*

arbeiðsplássi við lærusáttmála og fáa løn undir útbúgvingini.

Gaman í eru donsku útbúgvingarnar nakað longri enn tær føroysku, men tað kemst í fyrsta lagi av, at praktikktíðirnar á donsku útbúgvingunum eru væl longri enn í Føroyum. Hinvegin merkir tað so eisini, at næmingarnir gerast ein lutfalsliga týðandi partur av arbeiðsmegini úti á stovnunum, teir eru knýttir at, og verða eisini taldir upp í starvsfólkanormeringarnar, sum í Danmark eru lógarfestar.

– Tú kanst siga, at í Danmark er tað arbeiðsplássið, tann ávísi stovnurin, sum næmingurin er knýttur at, ið eigur næmingin, men í Føroyum er tað skúlin, ið eigur næmingin, sigur Vivie Kirke Davidsen.

## Fjarlestur riggar væl

Ein annar máti at økja um áhugan fyri útbúgvingunum á Heilsuskúla-



num, ikki minni námsfrøðihjálpara-útbúgvini, er at lata meira upp fyri fjarlestri, heldur stjórin.

Longu nú ber til partvíst at taka heilsuhjálparaútbúgvingina við fjarlestri. Tað verður gjørt soleiðis, at tann teoretiski parturin er skipaður við undirvísing á Heilsuskúlanum aðru hvørja viku og fjarundirvísing aðru hvørja viku.

Vivie Kirke Davidsen greiðir frá, at royndirnar við fjarundirvísing í heilsuhjálparaútbúgvingini eru stak góðar, og at onki er í vegin fyri eisini at skipa útbúgvingina til námsfrøðihjálpara eftir einum líknandi leisti.

Heilsuhjálparaútbúgvingin tekur tó bara 15 mánaðir tilsamans og námsfrøðihjálparaútbúgvingin



*– Tað hevur verið okkurt ynski norðanífrá um fleiri vikur við fjarundirvísing, men har hava vit sagt kortanei. Tað vilja vit ikki, tí vit eru vit bangin fyri, at vit tá kunnu missa fleiri næmingar, so teir koma í vanda fyri at detta niðurímillum. Spurningar, ivamál og stúranir hópa seg upp, tá tú hevur fjarundirvísing og ert burtur frá læraranum, og tí hevur tað stóran týdning, at tað ikki gongur ov long tíð ímillum, at næmingurin kemur í skúla og saman við læraranum fær tikið hond um alt*

*Mynd: Ingolf S. Olsen*

24 mánaðir. Í báðum førum er praktikktíðin íroknað.

Sjálv skúlagongdin í heilsuhjálparaútbúgvingini er tvær ferðir tríggjar mánaðir við einum praktikkskeiði ímillum. Við fjarlestri verður undirvísingin skipað soleiðis, at næmingarnir eru á Heilsuskúlanum tær fyrstu tríggjar vikurnar í tí fyrsta skúlaskeiðnum. Tá skulu teir koma at kenna hvønn annan og samansjóðast sum skúlaflokkur, setast inn í skúlatilfarið og læra allar mannagongdirnar, millum annað at brúka Teams, sum er samskiftispallurin í fjarundirvísingini. Restin av fyrra skúlaskeiðnum og alt tað seinna skeiðið er síðan skipað við fjarundirvísing og skúlagongd upp á skift aðru hvørja viku.

– Námsfrøðiútbúgvingin er væl longri, og tí skal hon eisini skipast øðrvísi við fjarlestri, men sjálvandi ber tað eisini væl til at hava fjarlestur har, sigur Vivie Kirke Davidsen.

## Skúlagongdin er neyðug

Stjórin sigur, at tað, sum tey hava stúrt mest fyri við fjarundirvísingini, er, um tey altíð fáa loftað øllum avbjóðingunum, sum næmingarnir møta í fjarundirvísingini.

– Um onkur næmingur til dømis stríðist við álvarsligt orðblindni, so kann fjarundirvísing sjálvandi verða ein trupulleiki. Men hinvegin, so byrja allir næmingarnir við at vera á skúlanum í nakrar vikur, og vit hava orðblindalærara, sum kannar lesiførleikarnar hjá øllum næmingunum, og tey, sum eru orðblind, fáa øll tey neyðugu amboðini, eitt nú hjálpiprogramm at installera á telduna, og sovorðið. So

eg haldi, at tann parturin er í lagi, sigur Vivie Kirke Davidsen.

Men tá tað nú riggar so væl at hava part av teoretisku undirvísingini sum fjarundirvísing, hví so ikki bara skipa alla undirvísingina aftaná tær fyrstu tríggjar vikurnar sum fjarundirvísing, kann ein spyrja.

– Ja, hasin spurningurin er ikki fremmandur, tí tað hevur verið okkurt ynski norðanífrá um fleiri vikur við fjarundirvísing, men har hava vit sagt kortanei. Tað vilja vit ikki, tí vit eru bangin fyri, at vit tá kunnu missa fleiri næmingar, so teir koma í vanda fyri at detta niður-ímillum. Spurningar, ivamál og stúranir hópa seg upp, tá tú hevur fjarundirvísing og ert burtur frá læraranum, og tí hevur tað stóran týdning, at tað ikki gongur ov long tíð ímillum, at næmingurin kemur í skúla og saman við læraranum fær tikið hond um alt. Í so máta hevur leisturin við aðru hvørjari viku í skúla riggað væl, og tað verður okkurt, sum líkist tí, um vit eisini sleppa at bjóða útbúgvingina til námsfrøðihjálpara sum eina kombi-nasjón av fjarlestri og skúlagongd, umframt praktikk sjálvandi, sigur Vivie Kirke Davidsen.

## Tvífaldað næmingatal

Í summar var gravgangur eftir at sleppa at lesa til námsfrøðihjálpara samanborið við í fjør. 14 næmingar fóru í gongd við útbúgvingina eftir summarferiuna, og tað er meira enn tvær ferðir so nógv sum í fjør, tá bara seks næmingar byrjaðu.

Vivie Kirke Davidsen ávarar tó ímóti at leggja ov nógv í stóru næmingaframgongdina.

– Útbúgvingartoymið á námsfrøði-útbúgvingini hevur gjørt eitt stórt og gott lobbyarbeiði, og tað hevur heilt vist munað. Men hetta er bara fjórða skúlaárið, at vit bjóða námsfrøðihjálparaútbúgvingina, og áhugin hevur verið sveiggjandi, so enn er alt ov tíðliga at tosa um nakran tendens í tølunum, sigur hon.

## Skjótari útbúgving

Skuldi tað blivið aktuelt, er rúm fyri at økja næmingatalið enn meira, tí tað kunnu verða upp í 24 næmingar í einum flokki á Heilsuskúlanum í Hovi.

Og Vivie Kirke Davidsen sigur, at tað eisini hevði borið til at tikið ein eyka flokk inn á námsfrøðihjálparaút-búgvingina, eins og gjørt er við sjálva námsfrøðiútbúgvingina á Fróðskaparsetrinum, um ynski var um tað.

– Men so skuldi umsøkjaratalið verið har eftir. Tað er tað ikki, sum er, so tað hevði verið neyðugt at gera átøk at gera útbúgvingina meira attraktiva, sigur hon.

Enn er tó onki, sum bendir á, at politiska skipanin ætlar at brúka námsfrøðihjálparaútbúgvingina á Heilsuskúlanum beinleiðis í royndini at basa stóra starvsfólkatrotinum á námsfrøðiligu arbeiðsplássunum.

Í staðin verður roynt at bøta um stóra starvsfólkatrotið við at taka fleiri námsfrøðiesandi inn á Fróð-skaparsetrið.

Tað tekur tó fýra ár at lesa til náms-frøðing, íroknað starvslærutíð upp á tilsamans 26 vikur. Útbúgvingin til námsfrøðihjálpara tekur hinvegin



bara tvey ár, íroknað starvslærutíð upp á tilsamans 40 vikur.

Um kynt varð undir ketlarnar á hesi útbúgvingini, hevði tað sostatt kunnað gingið skjótari at økt útboðið av útbúnari námsfrøðiligari arbeiðsmegi.

Skúlastjórin heldur, at um útbúgvingin bleiv skipað sum yrkisútbúgving og partvíst sum fjarundirvísing, ella tað í minsta lagi bar til at taka hana við síðuna av einum námsfrøðiligum arbeiði, so hevði tað helst kunnað gingið enn skjótari bæði at økt tilgongdina til útbúgvingina og útbúgvið verandi óútbúnu hjálparfólk.

## Ein politiskur spurningur

Við øðrum orðum er tað sannlíkt bæði lættari og skjótari at minka ógvusliga trotið á námsfrøðiligari arbeiðsmegi úr neðra heldur enn úr erva – nevniliga við at fáa útbúgvið fleiri námsfrøðilig hjálparfólk.

Men um politikararnir skuldu sett sær hetta sum mál sum eina lættari loysn upp á truplu starvsfólkastøðuna, so skuldu teir samstundis gingið ímóti sjálvari dagstovnalógini, har tað er ásett, at í minsta lagi tveir triðingar av starvsfólkunum á einum dagstovni skulu vera námsfrøðingar.

Ein annar møguleiki er sjálvandi, at teir gjørdu av at broyta dagstovnalógina og linka krøvini um býtið ímillum námsfrøðingar og námsfrøðilig hjálparfólk.

– Tað ber í hvussu er saktans til at fara tann vegin, men tað er ein politiskur spurningur, sum eg ikki ætli at leggja meg útí, sigur Vivie Kirke Davidsen.

Aðrastaðni í blaðnum siga bæði Djóni Nolsøe Joensen, landsstýrismaður í barna- og undirvísingarmálum, og Jógvan Philbrow, formaður í Pedagogfelagnum, tó greitt nei til at slaka upp á nevndu áseting í dagstovnalógini.

# Skúlaskipan rekur næmingar av landinum

**Meginreglan í føroysku skúlaskipanini er, at tað støðugt skal bera til at byggja omaná útbúgvingarnar. Men í so máta eru bæði námsfrøðiútbúgvingin og heilsurøktaraútbúgvingin á Heilsuskúlanum í Hovi settar út á eina síðubreyt, staðfestir stjórin. Útbúgvingarnar geva beinleiðis atgongd til bachelor-lestur í Danmark, men ikki í Føroyum**

INGOLF S. OLSEN – PRESS

– Skúlaskipanin í Føroyum er skrúvað soleiðis saman, at tú kanst taka eina miðnámsútbúgving, og so hevur tú tey fakini, sum skulu til at koma inn á eina bachelor-útbúgving. Við bachelor-útbúgvingini sleppur tú at lesa víðari og taka ein kandidat, og ætlar tú av álvara at granska, kanst tú síðan fara undir Ph.d.-lestur. Men soleiðis er tó ikki við okkara útbúgvingum, tí tær eru í roynd og veru settar út á eina síðubreyt.

Soleiðis sigur Vivie Kirke Davidsen, stjóri á Heilsuskúlanum í Hovi.

Heilsuskúlin bjóðar tríggjar útbúgvingar, nevniliga heilsuhjálparaútbúgvingina, heilsurøktaraútbúgvingina og námsfrøðihjálparaútbúgvingina. Heilsuhjálparaútbúgvingin gevur atgongd at lesa víðari til heilsurøktara á Heilsuskúlanum, men hvørki heilsurøktaraútbúgvingin ella námsfrøðihjálparaútbúgvingin geva beinleiðis atgongd til víðari lestur til ávikavist sjúkrarøktarfrøðing og námsfrøðing á Fróðskaparsetrinum.

## Duplo og lego

Ein hóskandi lýsing av trupulleikanum kundi verið, at á Heilsuskúlanum sunnanfjørðs byggja tey við duplo, meðan tey byggja við lego á Fróðskaparsetrinum norðanfjørðs. Og sum tey flestu, ið hava arbeitt á dagstovnum, munnu vita, so halda børnini tað vera stuttligt at spæla við bæði hvørt sær, men tað riggar ikki at byggja duplo-kubbar og lego-kubbar saman.

Útbúgvingarnar á Heilsuskúlanum eru sostatt blindvegir at kalla, tá tað ræður um víðarilestur í Føroyum, men tær geva beinleiðis atgongd til bachelor-lestur í Danmark.




Har eru útbúgvingarnar til bæði sjúkrarøktarfrøðing og til námsfrøðing skipaðar sum sonevndar yrkisbachelor-útbúgvingar (professionsbachelor), men sjúkrarøktarfrøðingar og námsfrøðingar, sum eru útbúnir á Fróðskaparsetrinum, eru vísindaligir bachelorar ella akademiskir bachelorar, sum teir ofta verða róptir.

## Passa inn í Danmark

Meðan heilsurøktaraútbúgvingin og námsfrøðihjálparaútbúgvingin á Heilsuskúlanum eru býtisbørn samanborið við aðrar føroyskar útbúgvingar, líkjast tær nógv teimum donsku yrkisútbúgvingunum til ávikavist SOSU-assistent og pædagogisk assistent.

Størsti munurin er, at á donsku yrkisútbúgvingunum eru næmingarnir knýttir at einum arbeiðsplássi og fáa løn undir útbúgving. Eisini eru tær longri enn tær føroysku, mest tí at praktikktíðin er longri í teimum donsku útbúgvingunum.

Og so sker tað sjálvsagt í eyguni á nógvum, at føroysku útbúgvingarnar fáa allar sømdir og meira afturat á donskum lærustovnum, men eru blindvegir í føroyskum lestrarhøpi.

## Bæði atgongd og avsláttur

Gaman í ber til at søkja inn á Fróðskaparsetrið eftir kvotu 2, men tá skulu aðrar fakligar treytir lúkast afturat einari møguligari útbúgving frá Heilsuskúlanum fyri at sleppa inn.

Við eini útbúgving sum námsfrøðihjálpari frá Heilsuskúlanum í viðførinum ber hinvegin til at at fara beinleiðis á danskan yrkisháskúla (professiónsháskúla) at lesa til námsfrøðing, og ein útbúgving sum heilsurøktari frá Heilsuskúlanum í Hovi gevur ikki bara beinleiðis atgongd at lesa til sjúkrarøktarfrøðing í Danmark, men gevur harafturat ein munandi avsláttur í lestrartíðini.

Vanliga er longdin á teim donsku sjúkrarøktarfrøðiútbúgvingunum



trý og eitt hálvt ár, men ert tú heilsurøktari áðrenn, so sparir tú eitt ár og kanst taka útbúgvingina upp á tvey og eitt hálvt ár.

## Illa hugsað

Stjórin á Heilsuskúlanum heldur ikki, at politikararnir og føroysku útbúgvingarmyndugleikarnir hava hugsað bygnað og avleiðingar serliga væl ígjøgnum, tá fyrst heilsuhjálpara- og heilsurøktaraútbúgvingarnar og seinni námsfrøðihjálparaútbúgvingin blivu settar á stovn í Hovi.

– Í Danmark verður tað viðurkent, at ein heilsurøktari hevur so nógva vitan og førleikar frammanundan, at hann saktans kann fáa ein trivaligan kreditt í lestrartíðini, um hann vil lesa til sjúkrarøktarfrøðing og gerast professiónsbachelorur. Men av tí, at útbúgvingin í Føroyum er skipað sum ein vísindaligur bachelorur, so verða somu førleikar ikki viðurkendir her, og tú sleppur ikki eingongd inn at lesa til sjúkrarøktarfrøðing, um tú bara hevur eina heilsurøktaraútbúgving frammanundan,



*– Tá tað bleiv farið tann akademiska vegin, og útbúgvingarnar til sjúkrarøktarfrøðing og námsfrøðing blivu broyttar til vísindaligar batchelorar, bleiv grundin løgd undir trupulleikunum, sum nú eru. Tí nú eru tað okkara útbúgvingar, sum mugu uppstigast við fleiri gymnasialum fakum, um tær skulu geva atgongd til vísindaligu bachelorútbúgvingarnar á Setrinum, sigur Vivie Kirke Davidsen, stjóri á Heilsuskúla Føroya í Hovi*

*Mynd: Ingolf S. Olsen*

eins og tú heldur ikki sleppur at lesa til námsfrøðing við námsfrøðihjálparaútbúgvingini, sigur Vivie Kirke Davidsen.

## Fíggindalig skipan

Stjórin á Heilsuskúlanum sigur, at hon væl skilir, hvussu skipanin hongur saman, men hon vísir á, at tað við verandi gongd eru útbúgvingarnar á Heilsuskúlanum og harvið eisini viðkvæmu starvsøkini, sum skúlin útbúgvir fólk til, ið eru við sviðusoð.

– Tað verður hugsað ógvuliga brúkara-óvinarligt, og skipanin er samanumtikið rættiliga fíggindalig mótvegis føroyskum lesandi, ið fegin vilja ganga hesa leiðina. Eg skilji væl, at Setrið helst vil hava ein ávísan status, sum skal avspeglast í útbúgvingunum og atgongdskrøvunum til tær. Helst hevur tað okkurt við teirra gransking at gera, tí tey vilja hava hana viðurkenda og alt hatta har. Men tað kostar í hinum endanum, sigur Vivie Kirke Davidsen.

Hon vísir eisini á tað margháttliga í, hvussu ymiskt útbúgvingarnar á Heilsuskúlanum verða sæddar í donsku útbúgvingarskipanini og tí føroysku. Í Danmark eru útbúgvingarnar fult út viðurkendar og heilsurøktaraútbúgvingin gevur kreditt í lestrartíðini, men í Føroyum noyðast heilsurøktarar og námsfrøðilig hjálparfólk at uppstiga seg í endar og kantar fyri yvirhøvur at hava ein møguleika at sleppa inn eftir kvotu 2, og tey, sum sleppa inn, fáa ongan avsláttur í lestrartíðini yvirhøvur aftur fyri hollu yrkisfakligu førleikarnar, tey hava.

## Ein akademisk kós

Tó at hon væl skilir, hvussu verandi skúlaskipan hongur saman – ella viðhvørt ikki hongur saman – so

skilir skúlastjórin als ikki, at politikarar og útbúgvingarmyndugleikar hava framt grundleggjandi broytingar í útbúgvingum, uttan at hesar broytingar og avleiðingarnar av teimum frammanundan eru bæði væl og virðiliga gjøgnumhugsaðar og gjøgnumarbeiddar.

Og her er tað í minni mun verandi útbúgvingar á Heilsuskúlanum, hon hugsar um, men heldur um avgerðina í síni tíð, at allar tær miðallongu útbúgvingarnar skuldu skipast sum útbúgvingar til vísindaligar bachelorar.

– Tá tað bleiv farið tann akademiska vegin, og útbúgvingarnar til sjúkrarøktarfrøðing og námsfrøðing blivu broyttar til vísindaligar batchelorar, bleiv grundin løgd undir trupulleikunum, sum nú eru. Tí nú eru tað okkara útbúgvingar, sum mugu uppstigast við fleiri gymnasialum fakum, um tær skulu geva atgongd til vísindaligu bachelorútbúgvingarnar á Setrinum.

– Talan er um gymnasial fak, sum ofta eru á høgum stigi, og sum fyri nógv av okkara lesandi eru tung at koma ígjøgnum. Og her skulu vit minnast til, at størsti parturin av teimum, sum søkja inn á okkara útbúgvingar, hvørki hava dreymar ella ætlanir um at fara víðari tann akademiska vegin. Summi av teimum høvdu neyvan heldur megnað tað, tí frammanundan er tað ivaleysa strævið hjá heilsurøktaranæmingunum at hava føroyskt á A-stigi og enskt á B-stigi, og námsfrøðihjálparanæmingarnir hava ikki færri enn fýra almenn fak á C-stigi.

– Tí eri eg bangin fyri, at uppaftur fleiri bara fara til Danmarkar at lesa, um útbúgvingarnar her gerast nógv truplari at taka, enn tær eru nú, sigur Vivie Kirke Davidsen.

## Ískoytisskeið er ein loysn

Hon væntar tó ikki, at politikararnir fara at rulla útbúgvingarskipanina aftur og gera sjúkrarøktarfrøðingar og námsfrøðingar til yrkisbachelorar.

– Skal eg vera púra erlig, so rokni eg als ikki við, at tað ber til at bakka aftur. Hugburðurin er tann akademiska vegin, og tað hevur helst eisini nakað við status at gera. Eg veit, at tað er ógvuliga trupult at broyta hugburðin hinvegin aftur, og í roynd og veru havi eg ikki hug at fara inn í nakað kjak um tað heldur.

– Men eg haldi, at tað hevði verið ógvuliga gott, um tað bar til at skipa tað soleiðis, at tey, sum bara ætla sær at vera røktarar ella námsfrøðihjálparar, kunnu taka tað, sum skal til, fyri at klára at passa tey størvini, uttan at noyðast at taka meira enn tað. Og so kundu vit havt ein pakka við ískoytisfakum til tey, sum ætla sær víðari.

– Í Danmark hava tey fakpakkar sum ískoytisskeið, tá ein útbúgving ikki røkkur at geva atgongd til ætlaðan víðarilestur. Her kundi tað so verið pakkar við føroyskum á A-stigi, enskum á B-stigi, kemi og onkur onnur fak á C-stigi, ella hvat veit eg – tað veldst um, hvørt ein skal lesa víðari til sjúkrarøktarfrøðing ella námsfrøðing. Um ískoytisfakini so skulu takast her ella í Havn – møguliga við síðuna av bachelorlestrinum – er ein praktiskur spurningur, sum tað ber til at loysa, sigur Vivie Kirke Davidsen, stjóri á Føroya Heilsuskúla í Hovi.

# TAÐ GÓÐA BARNALÍVIÐ

## 25. oktober skipar áhugabólkurin Dagstovnanámsfrøði í Føroyum fyri limatiltaki í Havn

Nú kvøldini gerast myrk og long verður eitt tiltak hjá áhugabólkinum Dagstovnanámsfrøði í Føroyum í Havn mikukvøldið 25. oktober.

Tá fáa vit høvi at nørdast við tí, vit brenna fyri og starvast við til dagligt. Tiltakið verður á Dagstovninum Lítlaskógi og byrjar kl. 19. Annika Østerø, Sóley Samuelsen og Sanna á Løgmansbø, ið allar eru dagstovnaleiðarar, fara at hugleiða um evnið "Tað góða barnalívið – hvørja framtíð ala vit børnini upp til".

Neyðugt er ikki við tilmelding til tiltakið, tað einasta, tit skulu gera, er at gjalda limagjaldið fyri 2023 til áhugabólkin Dagstovnanámsfrøði í Føroyum.

Limagjaldi er 100 krónur um árið og skal gjaldast á konto 9181-5392944 í Betri Banka. Nýggir limir eru vælkomnir at tekna seg.






*Næmingar og lærarar svinga væl saman sosialt í nýggja námsfrøðihjálparaflokkinum, sum byrjaði á Heilsuskúlanum í Hovi eftir summarfrítíðina*

*Mynd: Ingolf S. Olsen*

# NÆMINGAR VILJA HELST LESA VÍÐARI Í FØROYUM

**Í námsfrøðihjálparaflokkinum, sum byrjaði at lesa á Heilsuskúlanum í Hovi eftir summarfrítíðina, eru fleiri, sum hava hug at lesa víðari til námsfrøðing, og tey harmast, at tað ikki ber til bara at fara beint á Fróskaparsetrið, tá útbúgvingin á Heilsuskúlanum er liðug. Tí tey flestu vildu helst lisið víðari í Føroyum í staðin fyri at verða noydd til Danmarkar**

INGOLF S. OLSEN – PRESS

Teir 14 næmingarnir, sum fóru undir námsfrøðihjálparaútbúgvingina á heilsuskúlanum í Hovi eftir summarferiuna eru longu væl og virðiliga samansjóðaðir, og tey hava tað stuttligt á skúlanum. Tey skemta, arga og flenna og kundu fyri tað gingið í 7. ella 8. flokki.

Hýrinum feilti sanniliga onki, tá Pedagogblaðið var á vitjan, órógvaði undirvísingina eina løtu og fekk eitt prát við fýra av næmingunum – Sunnvá Mortensen úr Trongisvági,

Leif Vestergaard Hansen úr Havn, Brynjar J. Poulsen úr Hvalba og Báru Magnussen úr Trongisvági.

Tað er týðuligt, at hóast teir 14 næmingarnir hava ymiska søgu og koma úr ymiskum umhvørvum, so eru teir longu samanrunnir sum skúlaflokkur og javngamlir í sinni, sjálvt um p-tølini siga nakað annað. Teir yngstu næmingarnir eru um 20 ára aldur, og aldursforsetin Sunnvá Mortensen úr Trongisvági er 38 ár.

– Vit hava tað ordiliga gott saman, og eg hugsi als ikki um aldur, tá vit eru saman sum flokkur. Eg eri elst, og so er tað Leif, sum er eitt lítið sindur yngri, men hini eru í fyrru helvt av tjúgunum, greiðir hon frá.

Brynjar segði tað so gott í gjár, tá hann segði við meg, at "mann skuldi trú, tú bara var 20", leggur hon flennandi, men ikki sørt errin afturat.

Jú, næmingarnir á námsfrøðihjálparaútbúgvingini njóta skúlatíðina, men samstundis taka teir útbúgvingina í stórum álvara.

## Hugur til námsfrøði

Hetta er tann fjórði flokkurin á ungu útbúgvingini, sum fyrstu ferð tók næmingar inn eftir summarferiuna í 2020. Hugurin at søkja inn á útbúgvingina hevur verið misjavnur. Í fjør summar byrjaðu bara seks næmingar á námsfrøðihjálparaútbúgvingini, men hesa ferð eru teir 14.

Serliga nógvir suðuroyingar ganga í nýggja flokkinum samanborið við hinar árgangirnar. Eitt annað eyðkenni er, at lutfalsliga nógvir av teimum 14 næmingunum siga seg hava hug at lesa víðari til



*– Vit hava tað ordiliga gott saman, og eg hugsi als ikki um aldur, tá vit eru saman sum flokkur, sigur Sunnvá Mortensen úr Trongisvági, ið er aldursforseti í nýggja námsfrøðihjálparaflokkinum á Heilsuskúlanum í Hovi*

*Mynd: Ingolf S. Olsen*

námsfrøðing, tá tey eru liðug við útbúgvingina í Hovi.

Av tí sama argast teir um, at tað ikki ber til at fara beinleiðis av Heilsuskúlanum og á Fróðskaparsetrið at lesa til námsfrøðing. Í staðin noyðast teir til Danmarkar at lesa, um onki verður broytt.

22 ára gamli Brynjar J. Poulsen úr Hvalba er ein teirra, ið longu hevur gjørt av at fara at lesa til námsfrøðing, tá hann er liðugur við námsfrøðihjálparaútbúgvingina.

## Alt riggaði

Seinastu tvey árini, áðrenn hann í august fór undir námsfrøðihjálparaútbúgvinga, arbeiddi hann sum ófaklært hjálparfólk í Brosinum, sum er dagstovnurin í Hvalba.



*– Altso, um tað bar til bara at fara norðeftir við Smyrli á pedagogskúla, so hevði eg kanska gjørt tað. Tað er í hvussu er ein tanki, sum eg als ikki hevði torað at hugsað, áðrenn eg kom á skúlan her, men tað tori eg nú, sigur Bára Magnussen úr Trongisvági*

*Mynd: Ingolf S. Olsen*




*– Verður møguleiki at lesa víðari á Fróðskaparsetrinum uttan ov nógv roks, so vil eg nógv heldur tað. Men tann møguleikin er so ikki til staðar nú, og eg eri longu ótolin eftir at koma víðari. Tí fari eg beina kós niður at lesa, tá eg eri liðugur her, um onki er broytt til ta tíð, sigur Brynjar J. Poulsen úr Hvalba*

*Mynd: Ingolf S. Olsen*

– Eg havi ein likamligan veikleika, sum ger, at eg ikki kann fáast við nakað likamliga tungt arbeiði. Eg havi roynt at arbeitt á flakavirki, men tað gekk ikki í longdini. Eg fór so at fáast við fótbólt sum venjari hjá teimum ungu, og seinni bleiv eg mæltur til at fara í barnagarðin at arbeiða.

– Tey bæði, fótbóltsvenjingin og arbeiðið í barnagarðinum, riggaðu væl saman við tíðum, og eg fann út av, at eg sjálvur riggaði bara væl í Brosinum. Tað var mannfólki, tey høvdu brúk fyri, fekk eg at vita, og sjálvt um eg kanska ikki síggi tað so væl sjálvur, so havi eg altíð fingið at at vita, at eg dugi væl við børnum. Tað bleiv so leiðin hjá mær, og nú ætli eg at fara allan vegin og blíva námsfrøðingur, sigur Brynjar, sum framvegis er høvuðsungdómsvenjari í fótbóltsfelagnum Royn í Hvalba.

## Tryggir karmar

Hann býr heima hjá foreldrunum í Hvalba, so honum nýtist ikki at hugsa um innivist og dýra bústaðarleigu, nú hann tekur námsfrøðihjálparaútbúgvingina í Hovi. Men har fyri er hann sinnaður at fara úr tryggu kørmunum í Suðuroy alt fyri eitt, hann er liðugur á Heilsuskúlanum, og um neyðugt flyta til Danmarkar at lesa til námsfrøðing.

Enn ber í hvussu er ikki til hjá honum at fara á Fróðskaparsetrið at lesa, tí námsfrøðihjálparaútbúgvingin á Føroya Heilsuskúla í Hovi gevur ikki atgongd til námsfrøðilestur á Setrinum, har útbúgvingin er skipað sum ein vísindalig bachelorútbúgving. Men hon gevur atgongd at taka útbúgvingina í Dan-

*– Fjarlestur er eitt vánaligt hugskot. Eg var farin í HVS-læru, tá korona rakti. Tá bleiv skúlatíðin skipað sum fjarundirvísing, og fyri mítt viðkomandi riggaði tað illa. Tú lærir nógv meira í eini skúlastovu, har tú lætt kanst seta læraranum spurningar. Tað kanst tú ikki upp á sama máta, tá tú sitir við telduna, sigur Leif Vestergaard Hansen*

*Mynd: Ingolf S. Olsen*



mark, har hon er skipað sum ein yrkisbachelorútbúgving.

Um støðan í Føroyum er broytt um tvey ár, tá Brynjar er liðugur sum námsfrøðihjálpari, er eftir at vita.

– Verður møguleiki at lesa víðari á Fróðskaparsetrinum uttan ov nógv roks, so vil eg nógv heldur tað. Men tann møguleikin er so ikki til staðar nú, og eg eri longu ótolin eftir at koma víðari. Tí fari eg beina kós niður at lesa, tá eg eri liðugur her, um onki er broytt til ta tíð, sigur hann.

## Orðblindni

Tað ætlar 20 ára gamla Bára Magnussen úr Trongisvági ikki, tó at hon hevur fingið nógv betur mót upp á yvirhøvur at ganga í skúla, síðan hon fór undir námsfrøðihjálparaútbúgvingina eftir summarferiuna.

Tí í skúlagongdini á Heilsuskúlanum er tað gleðiliga hent Báru, at hond nú verður tikin um bókligu trupulleikarnar, hon alt lívið hevur stríðst við, og sum hava fingið hana at aftra seg at fara undir nakra útbúgving.

Orðblindalærari er nevniliga knýttur at Heilsuskúlanum, og hesin hevur staðfest, at Bára lýður av orðblindni. Og at fáa tað staðfest, er hon hjartans fegin um.

– Tað er faktiskt akkurát blivið staðfest her á skúlanum. Eg havi bíðað í eini 10 ár eftir hesum, men í fólkaskúlanum vildu tey als ikki kanna tað.

– Sjálv havi eg altíð vitað, at tað var okkurt, sum blokeraði, tá eg hevði so ringt við at lesa og fata tekstir. Í gerandisdegnum havi eg so bara brúkt tað, at eg havi sagt, at eri so seintfatandi. Tað var tað lættasta at siga við onnur, og við meg sjálva var eisini lættast at siga og hugsa "Bára tú ert bara seintfatandi, so alt tekur eitt sindur longri tíð hjá tær", greiðir hon frá.

## Ein nýggjur heimur

Nú fær Bára hjálp og vegleiðing og tey amboð, hon hevur fyri neyðini fyri at lætta um lesingina. Og tað hevur eisini latið eygu hennara upp fyri einum nýggjum heimi við nýggjum møguleikum.

- Altso, um tað bar til bara at fara norðeftir við Smyrli á pedagogskúla, so hevði eg kanska gjørt tað. Tað er í hvussu er ein tanki, sum eg als ikki hevði torað at hugsað, áðrenn eg kom á skúlan her, men tað tori eg

nú. Eg ivist tó nógv enn, tí eg royni at ansa eftir mær, og sjálvt um tað nú er staðfest, at eg eri orðblind, og eg fái góða hjálp, so havi eg framvegis ringt við at ganga í skúla, sigur Bára.

Hon býr heima hjá mammu síni í Trongisvági, og við sínum skemtingarsama og óhátíðarliga lyndi er hon altíð fyrst við glósunum til seg sjálva um, at hon trívist so væl undir velinum á mammuni.

So Bára er avgjørd á málinum og fær floksfelagarnar at flenna í kíki, tá hon við einum hvøssum eygnabrá sigur, at tað ikki kemur upp á tal at fara niður at lesa til námsfrøðing, tí longur frá mammuni enn til Havnar fer hon undir ongum umstøðum.

## Tvíbýtt samvitska

Og so nívir tvíbýtta samvitskan eisini, tí trotið á arbeiðsmegi er stórt allastaðni, og aftaná summarferiuna er tað versnað munandi á dagstovninum Mýrifípuni í Trongisvági, har hon hevur starvast sum ófaklært hjálparfólk í hálvt annað ár. Tí ikki færri enn fýra hjálparfólk á dagstovninum eru í senn farin til Hovs at lesa til námsfrøðihjálpara.

– Tað er so synd, at tey standa og mangla fólk, tí vit eru farnar, og tí havi eg als ikki hug at fara ov langt burtur. Men tey mangla jú eisini námsfrøðingar, bæði í Trongisvági og allastaðni, og tí er tað bara so vánaligt, at tað ikki ber til at fara norðeftir at lesa til námsfrøðing, tá útbúgvingin her er liðug. So líkamikið hvat eg velji at gera, so er tað ein trupulleiki, sigur Bára.

## Skifti í lívsleiðini

Sunnvá Mortensen fegnast um, at tað ber til at útbúgva seg til námsfrøðiligt hjálparfólk í Suðuroy, og fyri hana er tað nóg mikið, tí hon hevur ongar ætlanir um at lesa víðari, hvørki í Havn ella í Danmark.

Frammanundan er hon útbúgvin hárfríðkanarkvinna og hevur arbeitt í tí fakinum í nógv ár, men nú fekk hon hug at royna kreftir við onkrum heilt øðrum.

– Kanska hevði eg hugsað øðrvísi, um eg var 20 ár yngri, men nú hugsi eg als ikki um møguleikar at byggja upp á hesa útbúgvingina. Eg hugsi meira tað, at um eg fái pappírir upp hetta, so er hetta ein útbúgving, sum eg fái brúkt, og tað er fínt til mín, sigur Sunnvá.

– Tað hevur eisini alt at siga, at útbúgvingin er her suðuri, tí eg havi smá børn, tað yngsta er í vøggustovu, so um útbúgvingin var í Havn, so hevði als ikki farið, sigur hon.

## Royndir heima

Sunnvá hevur ikki frammanundan arbeitt á dagstovnum ella øðrum námsfrøðiligum arbeiðsplássum, men tað man ikki fara at bila, heldur hon.

– Eg eigi trý børn í aldrinum eitt til níggju ár, so eitt sindur av royndum havi eg, sigur hon  brosandi.

At hon gevst sum hárfríðkanarkvinna er tó ikki tí, at hon púra hevur mist hugin at arbeiða við saksinum.

– Nei, fyri at siga tað, sum tað er, so er tað tí, marknaðurin her suðuri ikki er til tað. Prísurin, tú kanst loyva tær at taka her suðuri, er ov



*Bakstøði og partvíst framtíðarætlanir eru ymisk, men hugurin at fáa sum mest burtur úr skúlagongdini í námsfrøðihjálparaútbúgvingini er hin sami hjá teimum fýra Leif Vestergaard Hansen, Sunnvá Mortensen, Brynjar J. Poulsen og Báru Magnussen*

*Mynd: Ingolf S. Olsen*

lágur. Eg tími væl at arbeiða sum frisør, men mann fær ov lítið burtur úr, fíggjarliga hekk tað ikki saman, og at enda orkaði eg ikki meira, sigur Sunnvá Mortensen.

## Tvær húsaleigur

36 ára gamli Leif Vestergaard Hansen er dani, men hevur føroyska konu og hevur búð í Havn síðan 2017. Upprunaliga er hann útbúgvin bóndi, men hann hevur eisini roynt seg sum ófaklært hjálparfólk í Frítíðarskúlanum við Løgmannabreyt í Hoyvík í tíggju mánaðir.

Størsta avbjóðingin hjá honum og familjuni er at skula gjalda tvær húsaleigur, nú hann er farin undir námsfrøðihjálparaútbúgvingina á Heilsuskúlanum.

– Tilsamans rinda vit 8.500 krónur í húsaleigu nú, og tað eru rættiliga nógvir pengar at skula av við, tá eg onga arbeiðsinntøku havi. Tað skuldi avgjørt verið eitt kollegium ella okkurt líknandi knýtt at skúlanum, har næmingar norðanfjørðs kunnu búgva heilt bíliga til leigu, sigur Leif.

*Toymið fyri námsfrøðihjálpara-útbúgvingina á Heilsuskúlanum í Hovi hevur gjørt eitt gott lobbyarbeiði at fáa fleiri næmingar at søkja inn á útbúgvingina. Arbeiðið hevur lønt seg, tí uptøkutalið er meira enn tvífaldað síðan í fjør, tá seks næmingar byrjaðu upp á útbúgvingina – eftir summarfrítíðina í ár fóru 14 næmingar undir útbúgvingina til námsfrøðihjálpara. Úr vinstru eru tað Vivie Kirke Davidsen, stjóri á Heilsuskúla Føroya, og Rakul í Lágabø Nolsøe og Eir Jógvansdóttir Norðberg, báðar úr toyminum fyri námsfrøðihjálparaútbúgvingina. Á myndini vantar Mariann Johansen, sum eisini er við í toyminum*

*Mynd: Ingolf S. Olsen*



Sjálvur býr hann til leigu í Vági, meðan hann gongur á Heilsuskúlanum.

## Løn hevði hjálpt

Leif hevur ikki hugsað so nógv um, hvørt hann fer at lesa til námsfrøðing eftir lokna útbúgving sum námsfrøðihjálpari, men hann heldur, at tað kanska hevði verið eitt framstig, um útbúgvingin til námsfrøðihjálpara bleiv gjørd til lønta yrkisútbúgving, eins og tann samsvarandi danska útbúgvingin til pædagogisk assistent.

Tað hevði helst økt um áhugan at søkja inn á útbúgvingina, heldur hann, umframt at tað í hvussu er hevði bøtt um fíggjarstandin hjá fólki norðanfjørðs, sum mugu finna sær leigubústað undir útbúgvingini.

## Nei til fjarlestur

Leif Vestergaard Hansen dámar hinvegin als ikki tankan um partvíst at skipa námsfrøðihjálparaútbúgvingina við fjarlestri, eins og tað verður gjørt í heilsuhjálparaútbúgvingini. Tí hann hevur bara ringar royndir við fjarlestri.

– Fjarlestur er eitt vánaligt hugskot. Eg var farin í HVS-læru, tá korona rakti. Tá bleiv skúlatíðin skipað sum fjarundirvísing, og fyri mítt viðkomandi riggaði tað illa. Tú lærir nógv meira í eini skúlastovu, har tú lætt kanst seta læraranum spurningar. Tað kanst tú ikki upp á sama máta, tá tú sitir við telduna, sigur Leif.

Enn er útbúgvingin til námsfrøðihjálpara á Heilsuskúlanum í Hovi ikki formliga skipað við fjarlestri, men eitt sindur av fjarlestri kemur tó inn ígjøgnum bakdyrnar nú.

Trot á lærarum ger nevniliga, at næmingarnir skulu hava føroyskt saman við heilsuhjálparanæmingunum, og skúlagongdin hjá teimum er skipað við fjarundirvísing aðru hvørja viku og uppmøting á Heilsuskúlanum aðru hvørja viku.

# Bíða enn eftir samráðingum



*Formaðurin í Pedagogfelagnum hevði væntað sær størri vælvild í sáttmálakrøvunum hjá mótpartinum, men hann hevur kortini góðar vónir*

*Mynd: Ingolf S. Olsen*

Sáttmálakrøvini blivu handað 6. september, men ikki fyrr enn 27. september sleppur Pedagogfelagið á sín fyrsta fund við Fíggjarmálaráðið og Kommunala Arbeiðsgevarafelagið um nýggjan sáttmála at koma í staðin fyri hann, sum fór úr gildi 1. apríl. Síðan verður aftur fundur 3. oktober.

Í virðing fyri mótpartinum verður onki avdúkað um innihaldið í sáttmálakrøvunum, men Jógvan Philbrow, formaður í Føroya Pedagogfelag, dylir tó ikki, at hann við truplu støðuni á almenna arbeiðsmarknaðinum í huga hevði væntað størri vælvilja frá mótpartinum.

– Men vit eiga at hava góðar vónir, og tað havi eg, tí sambært øllum tí, sum samgongumeirilutin alment sigur, so vil hon námsfrøðiliga arbeiðsmarknaðinum væl og viðurkennir okkara støðu, sigur Jógvan Philbrow.



*– Hjálparfólkini fara framhaldandi at vera eins týðandi og nú, og tí er tað eitt mál hjá okkum at vaksa um tann støðuga kjarnan við eini 300 hjálparfólkum og minka partin, har útskiftingin er títtari, samsvarandi, sigur Jógvan Philbrow*

*Mynd: Ingolf S. Olsen*

# ÁSETING UM STARVSFÓLKABÝTI SKAL STANDA VIÐ

**Hjálparfólkini kunnu als ikki verast fyri uttan, og tey skulu hava nógv betri setanarsømdir, sigur formaðurin í Føroya Pedagogfelag, men hann ávarar samstundis ímóti, at politikarar fara at gera sær dælt av støðuni og royna at linka krøv um námsfrøðiligt innihald á dagstovnum og serstovnum. Tí skal ásetingin í dagstovnalógini um býtið millum námsfrøðingar og hjálparfólk á dagstovnunum heldur ikki linkast, sigur hann**

INGOLF S. OLSEN – PRESS

Tað tekur tvey ár at útbúgva ein námsfrøðihjálpara og fýra ár at útbúgva ein námsfrøðing, og ein námsfrøðihjálpari er bíligari í rakstri enn ein námsfrøðingur. Tí kundi tað verið freistandi at sett ferð á at útbúgva hjálparar fyri skjótari at bøta um stóra starvsfólkatrotið á námsfrøðiliga arbeiðsmarknaðinum og gera minni burtur úr at økja útboðið av námsfrøðingum.

Óttin fyri hesum er ikki fremmandur hjá Jógvani Philbrow, formanni í Pedagogfelagnum, tí av royndum veit hann, at vitan og áhugi fyri námsfrøði og námsfrøðiligum innihaldi er í minna lagi hjá flestu politikarunum.

## Væl grundað áseting

Hann vissar tó um, at ein slík leið hevði fingið skarpan gang frá Føroya Pedagogfelag. Tí ongin skal sleppa at gera sær dælt av truplu støðuni.

Eitt dømi kundi verið dagstovnalógini frá 2000, har tað er ásett, at í minsta lagi tveir triðingar av starvsfólkunum á einum dagstovni skulu vera námsfrøðingar. Tað hevur verri enn so borið til at halda hesa áseting tey seinastu nógvu árini, um nakrantíð, og í dag verður hildið, at tað stendur væl til, um helvtin av starvsfólkunum á einum dagstovni eru pedagogar. Dømi eru eisini um stovur, har ongin útbúgvin námsfrøðingur er.

Tann støðan kann tó ongantíð brúkast sum grundgeving fyri at linka ásetingina í dagstovnalógini, vísir Jógvan Philbrow á, tí einasta orsøkin til, at ásetingin yvirhøvur er har, er, at tað ikki var nóg mikið til av námsfrøðingum at manna øll størvini á dagstovnunum, tá lógin kom í 2000.

– At støðan bara er versnað síðan tá, er ein sannroynd, men tað merkir ikki, at týdningurin av fakligheit

og námsfrøðiligum innihaldi er minkaður. Tí vildi tað verið eitt púra skeivt signal at sent, um onkur ætlaði at linka ásetingina í dagstovnalógini, sigur hann.

## Hjálparfólk í føst størv

Samstundis sum Jógvan Philbrow vil verja borg, tá tað ræður um fakligheitina, so leggur hann dent á, at bæði dagstovnaøkið og serstovnarnir høvdu verið um ein háls, um ongi hjálparfólk vóru, og tí er tað meira átrokandi enn nakrantíð at betra arbeiðsumstøðurnar og -sømdir hjá teimum.

Eitt nú heldur formaðurin í Pedagogfelagnum, at tann stóri, støðugi kjarnin av hjálparfólki, sum er ein fortreyt fyri, at stovnstilboð yvirhøvur kunnu hava opið, eigur at virðismetast fyri hetta.

– Nógv av hesum hjálparfólkunum hava fast starv, men ikki øll. Tað er onki í sáttmálanum, sum forðar fyri, at øll ella í hvussu er næstan øll fáa boðið fast starv. Men tað vísir seg, at almenni setanarmyndugleikin dámar at hava leysar setanir. Tað er ein óskikkur, sum vit fegin vilja til lívs, sigur Jógvan Phiilbrow.

Umleið 1000 av teimum 2000 limunum í Føroya Pedagogfelag eru hjálparfólk, og í felagnum rokna tey við, at okkurt um 600 av teimum hava starvast sum hjálparfólk í nógv ár og oftast á sama arbeiðsplássi eisini. Hetta er tann støðugi kjarnin av dugnaligum og sera álitandi hjálparfólkum, sum eigur ein stóran part av æruni fyri, at námsfrøðiligi arbeiðsmarknaðurin ikki langt síðan er hoknaður undir stóra starvsfólkatrotinum. Síðan eru okkurt um 400 hjálparfólkastørv við títtari útskifting.

Tann landsalmenni og tann kommunali arbeiðsmarknaðinum í Føroyum hevur í nógv ár havt eina tilgongd upp á umleið 40 nýútbúnar námsfrøðingar um árið – teir 30 útbúnir í Føroyum og 10 í Danmark. Men frágongdin av námsfrøðingum og hjálparfólkum tilsamans liggur ímillum 50 og 60.

## Fleiri støðug hjálparfólk

Sjálvt um tveir flokkar av námsfrøðilesandi nú verða tiknir inn um árið á Fróðskaparsetrinum, er tískil onki, sum bendir á, at starvsfólkabýtið tey næstu nógvu árini fer at koma nærri ásetingini í dagstovnalógini.

– Hjálparfólkini fara framhaldandi at vera eins týðandi og nú, og tí er tað eitt mál hjá okkum at vaksa um tann støðuga kjarnan við eini 300 hjálparfólkum og minka partin, har útskiftingin er títtari, samsvarandi. Tí tað krevur ógvuliga nógv av bæði námsfrøðingum og teimum støðugu og royndu hjálparfólkunum, tá nógv nýggj og óroynd hjálparfólk allatíðina skulu lærast upp.

– At eini 100 starvsfólk so javnt og samt koma og fara, er tó bara sunt, tí tað skal vera pláss fyri rekruttering, og at fólk líka koma inn at snodda til fakið og kanska fáa hug at útbúgva seg til námsfrøðing, sigur Jógvan Philbrow.

## Jógvan Philbrow:

# PERSÓNLIG SAMRØÐA EIGUR AT VEKTAST

**Formaðurin í Pedagogfelagnum heldur, at samrøða við umsøkjarar til námsfrøðilestur á Setrinum eigur at vektast og ikki bara akademiskir førleikar og yrkisroyndir. Annars eru tað smáting, sum mangla í hjá námsfrøðihjálparunum frá Heilsuskúlanum, fyri at teir lúka treytirnar fyri at lesa námsfrøði á Fróðskaparsetrinum, heldur hann**

INGOLF S. OLSEN – PRESS

Persónligu førleikarnir hjá umsøkjarum og teirra generella støða eiga at viga nógv meira enn í dag, um vanligu treytirnar ikki eru loknar fyri at sleppa inn á Fróðskaparsetrið at lesa námsfrøði.

Tað heldur Jógvan Philbrow, formaður í Pedagogfelagnum.

– Á Fróðskaparsetrinum eiga tey at leggja dent á eina persónliga samrøðu við umsøkjaran at vita, um hann er egnaður at koma inn á útbúgvingina. Ein slík samrøða sigur ofta nógv meira um evni og møguleikar hjá einum umsøkjara at klára útbúgvingina, enn um tað bara verður hugt at førleikum og royndum, sum kunnu skjalprógvast, sigur hann.

Formaðurin hevur eisini ilt við at skilja, at tað er so trupult at fáa námsfrøðihjálparaútbúgvingina á Føroya Heilsuskúla og útbúgvingina til námsfrøðing á Fróðskaparsetrinum at sampakka betur, so at tað verður meira ómakaleyst hjá námsfrøðihjálparunum at halda fram við lestrinum á akademiskum stigi í Havn, um hugur er til tess.

### Undanførsla

Hann heldur, at tað er ein undanførsla bara at skylda upp á, at føroyska námsfrøðiútbúgvingin er ein akademisk leið, sum endar við einum vísindaligum bachelorprógvi, meðan tann danska námsfrøðiútbúgvingin er ein yrkisleið, sum endar við einum prógvi sum yrkisbachelorur.

– Tey skylda upp á hvønn annan í Suðuroy og í Havn, og eg veit ikki, hvør hevur skyldina, um nakar, men sum eg síggi tað, so eru tað smáting, ið mangla í hjá námsfrøðihjálparunum, fyri at teir kunnu lúka

*Tað eigur at bera til at tillaga hjálparaútbúgvingina, so hon saman við ískoytisfakum livir upp til atgongdskrøvini á Setrinum, og annars eiga persónligar samrøður við umsøkjarar at verða nógv meira avgerandi fyri upptøku, tá ein umsøkjari ikki lýkur tey vanligu krøvini, heldur Jógvan Philbrow, formaður í Pedagogfelagnum*

*Mynd: Ingolf S. Olsen*



treytirnar at sleppa inn á Setrið. Tað eigur at bera til at tillaga útbúgvingina í Hovi, so hon saman við onkrum ískoytisfakum livir upp til atgongdskrøvini á Setrinum.

– Kanska er tað ískoytisfakini, sum eru trupulleikin – at tað er eitt stríð um, hvør av skúlunum skal betala fyri tað, altso hvørji játtan tað skal av. Tað kann ikki vera so ringt at finna út av tí, sigur Jógvan Philbrow.

Við danska alternativinum í huga, heldur hann, at tað er týdningarmikið, at ískoytisfakini kunnu takast við síðuna av námsfrøðilestrinum á Fróðskaparsetrinum, so at tey lesandi ikki skulu brúka kanska eitt hálvt ella eitt heilt ár upp á tað, áðrenn tey sleppa í gongd við at lesa.

# Námsfrøðingar eiga at manna námsfrøðistørv

**Landsstýrismaðurin í barna- og útbúgvingarmálum heldur, at tað hevur stóran týdning at verja borg og hjúkla um fakligheitina, sjálvt um starvsfólkatrotið á námsfrøðiliga arbeiðsmarknaðinum er ovurstórt, og tað kann vera lokkandi at slaka upp á faklig krøv og ásetingar**

INGOLF S. OLSEN – PRESS

Djóni Nolsøe Joensen, landsstýrismaður í barna- og útbúgvingarmálum, er kvikur at svara, tá hann verður spurdur um stóra starvsfólkatrotið á námsfrøðiliga arbeiðsmarknaðinum kundi freistað hann at sett fram uppskot um at broyta ásetingina í dagstovnalógini, um at í minsta lagi tveir triðingar av starvsfólkunum á dagstovnunum skulu vera námsfrøðingar:

– Ja, so hevði eg broytt tað til tríggjar triðingar.

Hann flennir, tí tað er sagt í skemti, men kortini er eisini álvari aftanfyri, tí Djóni Nolsøe Joensen, er sjálvur útbúgvin námsfrøðingur, og hann veit, hvussu viðkvæmt alt økið er. Ikki minni, tá tað rekur á kíkin, sum nú, og tí hann veit, hvussu lætt stórur partur av politisku skipanini hevur við at gleiva upp um hugtøk sum fakligheit og ábyrgd, tá tað snýr seg um námsfrøði.

– Eg veit ikki rættiliga, hví tað er so, men eg kann ikki koma í tankar um nakað annað fakøki, har tað verður góðtikið, at tað ikki eru tey við



*– Eg veit ikki rættiliga, hví tað er so, men eg kann ikki koma í tankar um nakað annað fakøki, har tað verður góðtikið, at tað ikki eru tey við teimum bestu kvalifikasjónum, sum manna størvini*

*Mynd: Ingolf S. Olsen*

teimum bestu kvalifikasjónum, sum manna størvini. Ongin ímyndar sær annað, enn at tað eru læknar, sum manna læknastørvini á sjúkrahúsunum og í kommunulæknaviðtalunum, og at tað eru útbúnir fólkaskúlalærarar, ið manna lærarastørvini. Men á námsfrøðiliga arbeiðsmarknaðinum er øðrvísið. Tað tykist, sum at fólk í størri mun halda tað vera í lagi, at tað er minni fakligheit á námsfrøðiligu arbeiðsplássunum, sjálvt um tað er teimum, vit líta til at taka sær av okkara børnum, sigur Djóni Nolsøe Joensen.

Hann vissar um, at hann við hesum ikki á nakran hátt ætlar at klikkja niður á hjálparfólkini.

– Tvørturímóti. Eg havi allarstørstu virðing fyri teimum, og vit vita øll, at uttan hjálparfólk hevði ongin stovnur havt opið í dag. Kortini standi eg, sum havi eina útbúgving í námsfrøði, við mína fakligu støðu, at námsfrøðilig arbeiðspláss eiga at verða mannað við námsfrøðingum. Tað letur seg bara ikki gera, og so mugu vit fyrihalda okkum til ta støðuna, sigur landsstýrsmaðurin.

## Betri sømdir

Djóni Nolsøe Joensen vísir á, at tað at fyrihalda seg til støðuna í eins stóran mun snýr seg um at hugsa um arbeiðsumstøðurnar hjá hjálparfólkunum, og tað snýr seg um bara at hugsa um námsfrøðiligu fakligheitina. Hann heldur til dømis, eins og formaðurin í Pedagogfelagnum í aðrari grein her á síðunum, at reglan eigur at vera, at hjálparfólk verða sett í fast starv.

– Vit vita jú, at vit í nógv ár fram ikki kunnu vera eina rúgvu av hjálparfólkum fyri uttan. Tí eiga tey, ið ynskja tað, at verða sett í fast starv. Óvissan við at skula søkja hvørt ár er eisini eitt, sum Hjálparfólkafelagið hevur gjørt vart við. Eg haldi, at tað eigur at vera reglan, beinanvegin eitt námsfrøðingastarv verður lýst leyst, at um ongin námsfrøðingur søkir, men bara hjálparfólk, so verður tað hjálparfólkið, sum er best skikkað, sett í fast starv, sigur hann.

## Truplar uppgávur

Sumt er torførari at loysa, uttan at slaka upp á fakligheitina, ásannar Djóni Nolsøe Joensen.

– Tað verða til dømis lagdar alsamt fleiri truplar uppgávur á dagstovnarnar. Og her má eg aftur leggja dent á, at hetta ikki skal skiljast, sum at eg ikki haldi, at hjálparfólk duga ella gera sítt arbeiði nóg væl. Men um eg til dømis eri námsfrøðingurin á eini stovu, havi tvey hjálparfólk afturat mær, og á stovuni eru 20 børn, harav fimm, ið annaðhvørt hava serligan tørv ella eru undir eftirliti av barnaverndini, so eigi eg ikki at leggja alla ábyrgdina yvir á hjálparfólkini, tí eg skal út at hava eina foreldrasamtalu, ella eg skal brúka ein tíma til at skriva ella okkurt triðja.

– Eg eigi ikki at kunna áleggja teimum so stóra ábyrgd. Men soleiðis er tað íverri blivið við tíðini, hjálparfólk mugu støðugt oftari taka sær av ymiskum, sum tey ikki eru útbúgvin til og tískil kanska ikki hava nakran møguleika fyri at síggja og handfara rætt, sigur hann.

# LOYSN SKAL VERA KLÁR NÆSTA SKÚLAÁR

**Tað gevur onga meining at hava eina útbúgving, sum ikki eisini er grundað á útbúgvingarnar longur uppi í útbúgvingarskipanini. Tí skal tað verða bundið saman ímillum námsfrøðihjálparaútbúgvingina og námsfrøðingaútbúgvingina til skúlaársbyrjan næsta ár. Tað sigur Djóni Nolsøe Joensen, landsstýrismaður. Hansara fólk hyggja at fleiri møguleikum, og sannlíkt verður loysnin ein pakki við ískoytisskeiðum**

INGOLF S. OLSEN – PRESS

Tað var ikki optimalt, at námsfrøðihjálparaútbúgvingin á Heilsuskúlanum í Hovi var sett í gongd fyri trimum árum síðan at kalla leys av restini av føroysku útbúgvingarskipanini. Tað heldur Djóni Nolsøe Joensen, landsstýrismaður í barna- og útbúgvingarmálum.

Tað vísti seg nevniliga skjótt, at útbúgvingin var ein blindvegur í føroysku útbúgvingarskipanini. Námsfrøðihjálparaútbúgvingin gevur nevniliga ikki atgongd at lesa til námsfrøðing á Fróðskaparsetrinum.

Í staðin mugu teir námsfrøðihjálparar, ið ætla sær at blíva námsfrøðingar, til Danmarkar at taka útbúgvingina. Teir donsku yrkisháskúlarnir taka nevniliga fegnir føroyingar inn, sum hava lokið nýggju útbúgvingina í Hovi – og tað enntá, sjálvt um føroyska námsfrøðihjálparaútbúgvingin er eitt ár styttri enn danska systirútbúgvingin, útbúgvingin til "pædagogisk assistent".

## Snópislig støða

Stendur tað til Djóna Nolsøe Joensen, landsstýrismann í barna- og útbúgvingarmálum, skal útbúgvingarskipanin sleppa burtur úr snópisligu støðuni sum skjótast. Ein arbeiðsbólkur arbeiðir tí nú við at snikka eina loysn saman, soleiðis at tað skal bera til at lesa til námsfrøðing á Fróðskaparsetrinum í Havn við námsfrøðihjálparaútbúgvingini í viðførinum. Gongst sum ætlað, skal ein loysn verða klár til skúlaársbyrjan næsta summar.

– Í mínum heimi gevur tað onga meining at hava eina útbúgving, sum ikki er grundað á útbúgvingarnar longur uppi í útbúgvingarskipanini. Áðrenn hjálparaútbúgv-

# Tveir nýggir flokkar

**Djóni Nolsøe Joensen hevur megnað at halda sítt vallyfti um at tvífalda kapasitetin á námsfrøðiútbúgvingini á Fróðskaparsetrinum.**

**Eftir summarferiuna byrjaðu tveir nýggir flokkar við okkurt um 22 næmingum í hvørjum. Næmingarnir eru upptiknir helvt um helvt eftir kvotu 1 og kvotu 2.**




*– Í mínum heimi gevur tað onga meining at hava eina útbúgving, sum ikki er grundað á útbúgvingarnar longur uppi í útbúgvingarskipanini, sigur Djóni Nolsøe Joensen, landsstýrismaður í barna- og útbúgvingarmálum*

*Mynd: Ingolf S. Olsen*

ingin knappliga bleiv stovnað, var tað eitt av mínum fremstu politisku ynskjum, at tað skuldi blíva lættari hjá royndum hjálparfólkum, sum ikki høvdu miðnámsskúlaprógv, at gerast námsfrøðingar. Hugsanin var, at hevði tú arbeitt eitt áramál á einum námsfrøðiligum stovni, so skuldi tú kunna søkja inn, og síðan taka nøkur av miðnámsfakunum sum ískoytisskeið, kanska í eitt hálvt ár ella so.

– Tað ber sjálvandi enn til at gera, men nú vænti eg, at námsfrøðihjálparaútbúgvingin er komin fyri at vera, og tí ræður um sum skjótast at finna eina loysn, so hon ikki verður verandi ein blindvegur. Vit mugu binda saman ímillum hana og bachelorútbúgvingina á Setrinum, sigur landsstýrismaðurin.

## Ískoytisskeið

Námsfrøðihjálparaútbúgvingin er sett saman eftir donskum leisti, og har er vanligt at brúka ískoytisskeið at uppstiga næmingar, ið ikki lúka vanligar upptøkutreytir.

- Arbeiðsbólkurin arbeiðir eisini í løtuni við júst eini loysn, har ein pakki við ískoytisskeiðum verður lagdur oman á námsfrøðihjálpara-útbúgvinga. Enn er tó ov tíðliga at siga, at tað verður endaliga loysnin, tí fleiri møguleikar verða kannaðir. Eisini kunnu fleiri bóltar koma í spæl í sambandi við arbeiðið hjá arbeiðsbólkinum, sum gera, at eg kanska fáa onkur onnur tilmæli, sigur Djóni Nolsøe Joensen.

Hann leggur dent á, at ein loysn við ískoytisskeiðum ikki má leingja lestrartíðina meira enn hægst neyðugt, tí annars er ov lítið vunnið.



*Úr vinstru eru tað Bosse Bergstedt, Dorthe Staunæs, Firouz Gaini, øll úr metingarnevndini, og Greta Jiménez*

*Mynd: Jógvan Philbrow*

# GRETA VARÐI PH.D. RITGERÐ UM TRIVNAÐ

8. september var ein stórur dagur í føroyskari námsfrøðigransking, tá Greta Jiménez varði sína ph.d.-ritgerð um føroyska dagstovnaøkið á Danmarks institut for Pædagogik og Uddannelse, DPU, við Aarhus Universitet í Keypmannahavn.

Føroya Pedagogfelag hevur saman við Granskingarráðnum og Tórshavnar Kommunu stuðlað granskingarverkætlanini, og verjan av ritgerðini gekk upp á stás, sigur Jógvan Philbrow, formaður í Pedagogfelagnum, sum sjálvur var til staðar á DPU í Keypmannahavn.

Karen Valentin, lektari á DPU, Aarhus Universitet, leiddi verjuna, og í metingarnevndini sótu Dorthe Staunæs, professari á DPU, Aarhus Universitet, forkvinna, Bosse Bergstedt, professari á Institutt for Pedagogikk, IKT og Læring,

Høgskolen i Østfold í Noregi, og Firouz Gaini, professari á Søgu- og samfelagsdeildini á Fróðskaparsetrinum.

Í síni ph.d.-gransking hevur Greta Jiménez sett sjóneykuna á trivnað á dagstovnaøkinum, og ritgerðin hjá henni ber danska heitið "At "reika" i den færøske daginstitution: En de-kolonial undersøgelse af trivsel i daginstitutionspolitik og praksis i rigsfællesskabet".

Hon hevur verið innskrivað á DPU, har John Benedicto Krejsler, professari, hevur verið høvuðsvegleiðari, og Mie Plotnikof og Eva Gulløv hjávegleiðarar.




*Mynd: Jógvan Philbrow*



*Eftir væleydnaðu verjuna hjá Gretu Jiménez var ein lítil samkoma uttanfyri, har høvi var at heilsa upp á og ynskja til lukku*

*Mynd: Jógvan Philbrow*

Lækkaðir umsitingarkostnaðir

# Allur ágóðin fer til tín



## Tað er vorðið bíligari at vera kundi í LÍV

Við miðvísum arbeiði hava vit í ár megnað at lækkað umsitingarkostnaðin úr 5 prosentum **niður í 4 prosent.** Harafturat er fasti árligi kostnaðurin lækkaður við heili 40 prosentum; **úr 300 krónum niður í 180 krónir.**

títt

liv.fo